# Stórfingin sjónleikarastevna

**Beint eftir Ólavsøku verður MáF vertur fyri størstu sjónleikarastevnuni í Føroyum nakrantíð**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*


*Estlendski bólkurin Voru Teatreatelier spælir leikin "Soul"*

Í døgunum 2. –6. august verður Meginfelag áhugaleikara Føroya, MáF, vertur fyri størstu áhugaleikarastevnuni í Føroyum nakrantíð. Talan er um sokallaðu NEATA –stevnuna, ið verður hildin annað hvørt ár og higartil hevur verið í Litava, Svøríki og Estlandi.

## Leikir og panel

Við á stevnuni verða 150 áhugaleikarar úr ymsum Norðureuropeiskum londum. Umframt sjónleikaraframførslur verða eisini workshops, har bólkarnir fara at greiða frá arbeiðinum við at seta leikin upp. Eisini verður eitt sokallað "Open forum", har m. o. estlendska Danute Vaigauskaité, formaður í North European Amatheur Theatre Association, Eyðun Johannessen, sjónleikari og leikstjóri, og Vár Berghamar Jacobsen, dramaturgur, verða í paneli.

Framførslurnar á stevnuni verða hesar:
Í Norðurlandahúsinum:
"Menniskjan og tey fornisku", Dramaverkstaðið úr Føroyum
"Som ørnen kunne se", Pakkutat úr Grønlandi
"Theatrical Fantasies", Paradox úr Hvítaruslandi
"Erelnycia", Rokiskis Folk Theatre úr Litava
"Karols", Saldus Amateur Theatre úr Lettlandi

## Á Tjóðpalli Føroya:

"Soul", Voru Theatreatelier úr Estlandi
"Ja, må jag leva", Musikteaterföreningen Oliver úr Svøríki
"Memento Mori", Leikfélagið Hugleikur úr Íslandi
"Whit's Ahint", Serpentine Drama úr Hetlandi
Í Sjónleikarhúsinum:
"Mot slaktevekt", Hinsides Hekneby úr Noregi
"Koldt", DRAKOMIR úr Danmark
"Hørpuríma", Havnar Sjónleikarafelag úr Føroyum

Umframt framførslurnar verður onkur Happening eisini í Havnar gøtum hesar dagarnar

# Fimm nýggjar bøkur frá Bókadeildini

**Bæði kendar og heilt nýggjar verur og søgur eru at finna í forvitnisligu bókarúgvuni frá Bókadeildini hesuferð**

NÝGGJAR BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




Millum nýggjastu útgávurnar frá Bókadeild Føroya Lærarafelags eru framhaldssøgur um bæði Malju, Karl K, og Ulf og Percy, sum tey flestu longu munnu kenna. Men eisini heilt nýggjar verur og søgur eru at finna í teimum fimm nýggju og snotiligu bókunum.

Snarljós og ælabogar Undurfulla veðurbókin hjá Malju er veðurbók til tey smáu. Við Malju læra børn um veðurlag. Ein sera vøkur, litføgur bók við klaffum og hjólum, sum mala, og nógvum, sum togast kann í. Bókin er prentað á hart papp og er 14 bls. Niels Jákup Thomsen týddi.

## Skálkafroskurin

Lítli froskur er fitt søga um lítla frosk, sum datt av himli og gjørdi nógv fortreð. Um hvussu hann stakk av heimanífrá, men




varð afturfunnin og um øll skálkabrøgdini, sum endaðu á savni. Eisini søgan um, tá Lítli froskur bakaði telefonina í bakarovninum. Ein stuttlig bók, sum ivaleyst nógv børn kenna seg aftur í. Um bókina sigur ummælari í danska Ekstra Blaðnum: "Soleiðis sameinast Lítli froskur, Emil úr Lønnebergi og Prinsessan á ertrini á vakrasta og treiskasta hátt í einari eymligari barnabók til børn og væl uppdrigin vaksin"

Bókin, sum er væl egnað til tey 4 til 6 ára gomlu, er 30 bls. Ingibjørg Kamban týddi




## Vaksin eru løgin

Karl K. undir sólini er sjálvstøðugt framhald av bókini Karl K. einligur sonur, sum Bókadeildin gav út í fjør. Vaksin eru løgin, tað má Karl K. sanna ferð eftir ferð.

Karl K. skal í EuroDisney við Kim og familju hansara, men fyrst skal hann í summarhús við sínari egnu familju, til dømis við Herlufi, ið sær sova í yvirkoygingi, sjálvt um hann er 30 ár, og abbanum, sum hvørki hevur bil ella koyrikort, men eina meining um alt.

Bókin, sum er væl egnað til tey 7-9 ára gomlu, er 52 bls. og er innbundin. Sjúrður Gullbein týddi.




## Ulf og Percy eru aftur

Vinur mín Percy, Buffalo Bill og eg er ein skemtilig bók um vinmenninar Ulf og Percy. Bókin er sjálvstøðugt framhald av bókunum Gandaskógvarnir hjá vini mínum Percy og Vinur mín sjeikurin í Stureby. Í hesi nýggju bókini fer Ulf at halda summarfrí hjá ommu og abba sínum úti á bygd. Seinni kemur Percy at vitja - óboðin væl at merkja. Í fyrstani er Ulf ikki glaður, tí hann hevur sæð eina gentu…

Bókin, sum er væl egnað til tey 10 til 13 ára gomlu, er umleið 212 bls. Hugin Eide týddi.




## Hetjur og skálkar

Askur & Embla er um ein bonk, ein drong og eina gentu í einum lítlum býi á einum torgi aftan fyri standmyndina av Aski og Emblu. Drongurin byrjar at byggja heimar og søgur við sær sjálvum í høvuðsleiklutinum. Og í øllum ævintýrum við tær sjálvum í høvuðsleiklutinum endar alt lukkuliga. Skálkarnir fáa tað, teir hava uppiborið, hetjan verður fagnað og mussað…

Tekstur er á vinstru síðu og svørt/hvít mynd á høgru síðu. Ein øðrvísi stuttskaldsøga, har tú ført eina kenslu av at lesa eina teknisøgu. Høgni Mohr týddi. Askur & Embla, sum er til tey ungu og skjót og løtt at lesa, er 208 bls.

MYNDIRNAR SKULU SETAST SO TÆR PASSA TIL TEKSTIN

# Rithøvundar á G!

**Sum nakað rættiliga forkunnugt verður í ár høvi at hitta norðurlendskar rithøvundar á G! festivalinum**

G! FESTIVALUR

Tað er G! saman við Stavanger kommunu, sum í fyrsta umfari hevur tikið stig til at fáa unga, norska høvundan Johan Harstad at koma framvið á festivalinum í ár. Johan Harstad hevur givið fleiri bøkur út, men gjørdist av álvara kendur, tá hann í fjør gav út skaldsøguna "Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet", sum fyri tað mesta fer fram í Føroyum.

Bókmentaliga innslagið á G! verður framt í samstarvi við menntanartíðarritið Outsider Magazin. Í nýggjastu útgávuni av tíðarritinum eru samrøður við bæði Harstad og fleiri aðrar norðurlendskar rithøvundar. Í løtuni verður arbeitt við at fáa fleiri av hesum høvundunum at verða við á G! festivalinum.

ave

# Konsertir við Audite

**Um mánaðarskiftið fer danska kamarkórið Audite at hava eina røð av konsertum í Føroyum. Skráin verður ein samanseting av kirkjuligum og verðsligum sangum**

KONSERTIR


*Um mánaðarskiftið verður danska kamarkórið Audite á konsertferð í Føroyum*

Kamarkórið Audite varð stovnað fyri 20 árum síðani. Kórið er sera virkið og heldur nógvar konsertir, har høvuðsdenturin sum oftast er kirkjuligur tónleikur, bæði a cappela men eisini sum størri verk við fylgispæli og professionellum solistum. Kórið verður stjórnað av Adam Faber.

Skráin tey fara at framføra í Føroyum, verður ein a capella blanding av kirkjuligum og verðsligum tónleiki.

Konsertir hjá Audite í Føroyum:
Listasavnið, Tórshavn
Týsdag 27-06-2006.
Kl. 20.00
Christianskirkjan, Klaksvík
Hósdag 29-06-2006
Kl. 19.00
Fuglafjørður Fríggjadag 30-06-2006 Kl. 16.00
Fuglafjarðar kirkja
Fríggjadag 30-06-2006
Kl. 20.00
Dómkirkjan, Tórshavn.

Matinékonsert
Leygardag 01-07-2006
Kl. 11.30

ave